


Í mannamunni hevur Old Trafford í mong ár borið heitið, Theatre of Dreams. Og tað er eingin loyna, at tað eisini er dreymurin hjá mongum at síggja the Mighty Reds spæla á heimavølli.

Saman við MB-Tours hevur tú nú møguleikan til at fáa dreymin uppfyltan. Tann 20. september er nevnliga ein av ársins dystum í Premier League, tá Manchester United tekur ímóti Liverpool. MB-Tours skipar í hesum sambandi fyri ferð til dystin, og saman við Sosialinum lutar MB-Tours eisini eina ferð burtur til dystin.

Fyri at vera við í kappingini um dreymaferðina krevst bara, at tú tekur lut í kappingini, sum Sosialurin skipar fyri. Spurningarnir eru í Sosialinum, dagarnar 11.- 24. august 2004.

Hvørja ferð eru tríggir spurningar, sum hava eitthvørt við hesi bæði mætu ensku feløgini at gera. Alt, sum tú skalt gera, er at svara spurningunum, so hvørt hesir eru í blaðnum, og síðani senda teir tíggju svarleparnar inn til okkara. Brævbjálvar við seðlunum skulu merkjast "kapping", og skulu sendast til:
**Sosialurin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Saman við svarlepunum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummarið hjá tær. Drigið verður um vinningin mánadagin 30. august, og mugu seðlar til kappingina tí vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 28. august.

Klipp henda spurnarlepa út, og send til Sosialin

**8 - DRIBLINGAR Á KANTINUM**
**Teir eru leikararnir, sum fólkið elskar at síggja. Klassisku bretsku vongspælararnir, sum við driblingum og fintum lyfta fótbóltin upp á listarligt støði. Tríggjar av teimum skulu vit finna fram til í dag.**

1. Norðurírski criblikongurin, sum av mongum verður mettur sum størsta talentið í alheims fótbóltssøguni. Tíverri fyri fótbóltin dugdi hann sær ikki nóg væl hógv uttan fyri fótbóltsvøllin, og seinastu mongu árini hevur tað mest verið fyri rúsdrekkatrupulleikar sínar, at hann hevur prýtt forsíðurnar.

Svar: ____

2. Hóast hann ofta leikti mitt fyri, so megnaði hesin myrki vongspælarin sum fáur at senda mótstøðumenn til viks, tá farast skuldi fram eftir vøllinum. Sparkiteknikkurin var framúr, og ofta sendi hann eisini frispark beinleiðis í kassan. Hvør er leikarin, sum kom til Liverpool úr Watford, og sum seinni royndi seg sum leikari í Newcastle saman við t.d. Ian Rush?

Svar: ____

3. Á Manchester-liðnum í dag er tað hesin leikarin, sum hevur dystametið. Hóast hann framvegis bara er 30 ára gamal, hevur hann í eini 12-13 ár verið roknaður sum ein av bestu vongspælarunum í Stórabretlandi. Bert spell, at tað ikki hevur eydnast honum og walisisku landsmonnunum at spæla seg fram til nakað endaspæl fyri landslið.

Svar: ____

Navn: ____

Bústaður: ____

Telefon: ____

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
MB-TOURS


# ítróttur

Nr. 157 • fríggjadagur • 20. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Todi er gandaður á landsliðnum

**Hóast hann enn eina ferð noyddist at geva avboð, tí hann var skaddur, so roknar álopsspælarin við, at hann verður tøkur aftur um eina viku, men tað er torførari at siga, hvussu venjingarstøðan fer at vera undan ferðini til Sveis**



*– Tað gevur onga meining at tosa um gand. Men hetta var undarligt, helt Todi Jónsson, nú tað enn einaferð barst honum frá at spæla landsliðsfótbólt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÓHEPPIN STJØRNA
*Jóannes Hansen*

Eingin ivi er um, at hann er stjørnan í føroyskum fótbólti. Hann hevur rokkið longri enn nakar annar føroyskur spælari, og hann er toppskjútti á landsliðnum. Hann er skrásettur fyri 43 dystir. Alt var lagt upp til, at hann skuldi havt verið við fyri 44. ferð mikukvøldið. Mótstøðumenninir vóru av sovornum slagi, at tað ivaleyst hevði ligið væl fyri hjá honum eisini í triðju royndini ímóti Malta at skjóta mál - kanska fleiri mál.

Men Todi Jónsson - sjálvandi er tað hann, at talan er um - taldist millum áskoðararnar. Portalurin visti á middegi mikudagin at siga frá heimasíðuni todi.fo, at Todi var skaddur og ikki fór at spæla við. Eingin ivaðist á Svangaskarði um, at tað vóru áskoðarar, sum settust aftur, og onkur helt fyri á Svangaskarði, at FSF mundi missa inntøkur, tí tað so tíðliga lak út, at Todi ikki fór at vera við.

– Men tað verður harvið. Vit mugu spæla við opnum kortum og ikki lokka fólk at koma undir skeivum fyritreytum. Tað hevði bitið seg sjálvan í halan, helt FSF aðalskrivarin, Ísak Mikladal, sum fyri venjaran eftir døgurða dystardagin sendi boð eftir Jónhardi Frederiksberg.

*Ert tú gandaður á landsliðnum?*

Todi Jónsson:

– Tað gevur onga meining at tosa um gand. Men hetta var undarligt. Allir fótbóltsspælarar vita, at tað í hesum fakinum støðugt spøkja møguleikar fyri skaðum, um vit skulu halda okkum til gandavendingar. Eg hevði kent okkurt smávegis, uttan at eg hevði roknað við, at hetta skuldi vera orsøk til, at eg ikki fór at vera førur fyri at spæla. Eg var rættuliga spentur upp á enn eina ferð at spæla ímóti Malta. Men undir venjingini týsdagin kendi eg, at alt var ikki, sum tað átti at vera, og tá ið vit mikumorgunin høvdu taktiska venjing, var tað mær longu greitt undir upphitingini, at knúturin í lærvøddanum var so mikið stórur, at tað fór ikki at bera til at spæla ímóti Malta. Tað eri eg sera harmur um.

*Verður tú við ímóti Sveis?*

– Tað eru tríggjar vikur til ta ferðina. Eg rokni við, at hetta verður í lagi aftur heilt skjótt. Stóri spurningurin er, um eg fari at hava møguleika at spæla á landsliðnum. Tað er verkfall í Danmark. Tað hevur við sær, at eg og allir hinir í FCK, sum eru limir í spælarafelagnum, ikki hava møguleika at venja í felagnum. Meðan tað er verkfall og verkbann ber tað heldur ikki til at fáa dystarvenjing. So vit mugu bara vóna, at tað fara at vera fyritreytir at spæla. Eg vil í hvussu so er fegin vera við.

Hvat heldur tú um dystin ímóti Malta?

– Tað er altíð hugaligt, at Føroyar vinna. Tað er ikki oftari enn so. Føroyska liðið var í óvandari støðu. Tað plagar at vera mótstøðuliðið, sum myndar spælið. Hesa ferð vóru okkara spælarar í tí støðuni. Í altjóða dystum er neyðugt at hava stóra úrtøku burturúr málmøguleikunum, tí teir eru ikki so nógvir. Har høvdu vit trupulleikar hesa ferð, men tað er positivt, at liðið spælir seg til møguleikar.

## Undirmettu eina løtu

**Henrik Larsen helt eftir dystin, at trupulleikarnir hjá okkara monnum fyrst og fremst komust av, vit eina løtu høvdu hug at undirmeta mótstøðuna**

VENJARIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá føroyska fótbóltslandsliðið vinnur, so er einki at siga til, at venjarin er fegin, og Henrik Larsen hevði eisini smílið frammi eftir dystin móti Malta.

Men samstundis er einki at taka seg aftur í, at tað vóru lutir í føroyska spælinum, sum kundu verið betri. Og hetta ásannaði Stóri eisini.

– Eg haldi serliga, at fyrstu 20 minuttirnar eftir steðgin vóru ikki nóg góðir. Har gera vit ov nógv mistøk, soleiðis at teir koma aftur í dystin.



*Allir gjørdu sítt arbeiði, og eisini teir, sum vórðu skiftir inn, gjørdu tað gott, helt Henrik Larsen eftir sigurin á Malta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Annars haldi eg, at vit serliga í fyrra hálvleiki høvdu fult tamarhald á. Kanska var tað eisini so, at vit eftir steðgin fóru at taka okkum av løttum, og tað vita vit ikki gongur.

Annars tóktist venjarin eitt sindur bilsin um, hvussu høgt tekniska støðið hjá maltesum var, og tað helt hann eisini skapti nakað av trupulleikum hjá okkara, sum hann tó rósti fyri gott arbeiði.

### Rós til allar

Tað er eingin loyna, at fleiri av innskiftu leikarunum gjørdu eitt sera gott arbeiði, men Henrik Larsen vildi tó ikki taka nakran leikara hjá sær framum.

– Eg haldi, at allir leikararnir hjá okkum eiga rós uppiborið. Teir gjørdu allir sítt arbeiði, og eisini teir, sum vórðu skiftir inn, gjørdu tað gott. Har hevði Jónhard tað kanska eitt sindur trupult, tí hann hevði jú als ikki vant við okkum undan dystinum, men eisini hann gjørdi ein góðan figur, so alt í alt haldi eg, at eg eri væl nøgdur, segði altso Henrik Larsen at enda.